# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Tórálvi Stenberg til áminnis



*Í Sandvíkar bygd hann vaks til mans,*
*Vinurin hann vit í dag munnu minnast*
*Altíð so var tað stavnhaldið hans:*
*Millum teir fremstu støðugt at finnast*

*Á Tvøroyri hann í realskúlan fór*
*At nema tað besta, tey kundu hann læra.*
*Men tá kendist verðin alt ov stór,*
*So best var fyrst til skips at fara.*

*Tí hann hevur eisini verið við slupp,*
*og sum rættur maður við vaðbeini staðið.*
*Tó tíðliga mundi hann leggjast upp,*
*Vildi heldur fáast við almannafæið.*

*Á Gjaldstovuna norð hann mundi fara,*
*har landsins ognir og skuld at hagreiða.*
*Har mundi hann eisini tað kynstrið læra,*
*Bæði tollarar og syndarar at avgreiða.*

*Til Keypmannahavnar brátt leiðin gekk,*
*Tó fyrst á Købmandshvile eitt skeið at fáa.*
*Síðani tú tann mikla lærdóm fekk,*
*Tey virki og stovnar rætt at grannskoða.*

*Hjá Aage Dahl tit fingu tykkum búð,*
*Og har mundu støðugt ætt og vinfólk finnast.*
*Tí inni hjá tær og tíni vøkru frú,*
*Vit mangar, góðar, ríkar løtur minnast.*

*Og Ballerupfelagið tit skjótt komu í,*
*Okkum øllum til alstóra gleði.*
*Tí aldrin tit firnaðust nakað stríð,*
*Men skipaðu dans og veitslur so fegið.*

*Tú sjómannsvísur fyri okkum kvað,*
*Og Torbjørn harmoniku spældi.*
*Til Singapor´og Adelaid´ vit fóru av stað,*
*Og seglini á "Taifununi" vit taldu.*

*Og bleivst tú ei sjómaður burtur av*
*Við gyltum snórum og gullknøppum.*
*Tú hevur tó ført oss um tað kvæðahav*
*Fylt við vøkrum moyggjum og avrekskøppum.*

*Á mangari veitslu hava vit Ormin tikið,*
*Og skotið Harra Hermann fyri bróstið,*
*Og teir danir og sviar av bunka rikið,*
*Og funnið Jákup djúpt í einum køsti.*

*Og vit hava verið við í Runsival*
*Og barst við risar við høvdum so ljótum.*
*Men altíð so gekk tað líka væl,*
*Tí tú - tú hevði dansin undir fótum.*

*At takka fyri alt, tú okkum hevur givið,*
*Tað megna vit ei av sonnum.*
*Tí her hevði als eingin dansur blivið*
*Hevði tú ikki lagt lag á hjá monnum.*

*Nú ert tú ei longur blant oss á foldum,*
*Í himnaskara tú lítur teg í kring.*
*Og hóast eingin treður dansin undir moldum,*
*Vit vænta tó, at tú skjótt slær ein ring.*

*Og har mannst tú hitta teir kappar reystu*
*Ja, Viljormur Kornus og Gudbrand við.*
*Í himnasali nú kvøða teir treystu*
*Og einglarnir dansa lið um lið.*

**Føroyskt Felag í Ballerup**

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Niels Brogård** fer úr kapellinum á Landssjúkrahúsinum sunnudagin klokkan 17. Jarðarferðin verður mánadagin klokkan 14 úr Vestmanna kirkju. Sungið verður sálmabókini

**Oliver Hansen** Vestmanna andaðist 24. januar í heiminum, 46 ára gamal.

## Tøkk

Takkað verður øllum tykkum, sum gleddu meg og gjørdu 90 ára dagin hugnaligan og minnisríkan.

**Hilma**

**Dagurin**
Valerius. Var síðst í 3. øld biskupur í Trier í Týsklandi.

Slýsingar

nýggjur lýsingarmiðil
Tel 34 18 00 s-lysingar@sosialurin.fo Sosialurin

## Millumskúlaflokkur í 1925

**Mynd frá "realskúlaframsýningini 1916-66" sum Jórunn Dánjalsdóttir skipaði fyri í Kommunuskúlanum í Havn í summar. Her er ein mynd av 2. millumskúlaflokki í 1925**



*Aftasta rað f.v.: Olaf Magnussen (Saksun), Jens Pauli í Dali, Heini Johansen (á Trøðni), Hendrik Jacobsen (hjá Mikk í Dávastovu), Óli Elingsgaard (Egilstrøð) (Eiði) og Adler Olsen (hjá Onnu Sam)*
*Miðraðið f.v.: Kári Evensen, Niclas Andreasen, Theodor við Keldu, Erling Skarðhamar, Alif ?, Janus Kamban og Sigmund Hoydal*
*Fremsta rað f.v.: Gunnar Isholm, Johan Mortensen, Svend Skarðhamar, Eliesar Johansen (Illeba), Jørgensen, lærari (hann var dani), ókendur, Ludvig Mohr, Viggo Andreasen og Jacob Højgaard, Toftir (bleiv seinni kommunulækni í Havn)*

Um onkur hevur hug at ogna sær hesa mynd, er viðkomandi vælkomin at venda sær til Jórunn Dánialsdóttir á telefon: 226024.

*Myndaeigari: Fornminnissavnið*